Hevur tú ein spurning ella onkran trupulleika, sum tú kundi ynskt tær at fingið viðgjordan í hesum teiginum.

Spyr Sosialin

Skriva til: Sosialurin, postsmoga 76, 3800 Argir. Merk brævbjálvan »Spyr Sosialin«.



Eyðun Joensen, sálarfrøðingur



Marjun Sigurdsdóttir, sosialráðgevi



Marner Simonsen, lækni



Turið Debes Hentze, løgfrøðingur

Hvussu verður hon tryggjað?

Vinkona mín er fyri stuttum vorðin einsamøll. Hon hevur livað pappírsleyst saman við manni sínum í eitt áramál.

Nú er hann bráddliga farin, og einki skriv er eftir hann, sum sigur, at vinkona mín er tryggjað við arv ella á annan hátt.

Er nakað mark fyri, hvussu leingi fólk liva pappírsleyst saman áðrenn tey kunnu arva, tá annar parturin fer?

Hvussu skal vinkonan fyrihalda seg nú. Hon hevur arbeiði, og hevur á jøvnum føti við mannínum verið um peningaligu viðurskiftini í heiminum.

Vinkonan

Eitt vígslubræv er eitt rættsligt skjal, og tað uttan mun til romantikk.

Hetta rættsliga skjali, vígslubrævið, er grundarlagið undir rættindunum millum mann og konu, millum annað viðv. ognum, arvarætti og t.d. í viðurskiftum yvirfyri tí almenna.

Kona og maður, ið liva saman uttan at verða vigd, hava ikki sama rættargrundarlagið at byggja á. Um tey ynskja at tryggja hvønn annan, mugu tey gera tað á annan hátt. Tað kundi til dømis verið við einum testamenti ella bara eini avtalu um, hvor eigur hvat.

Í hesum førinum, ið tygum nevna, er, eftir tí, ið verður upplýst, eingin avtala, ið hvussu er eingin skrivlig avtala. Ofta er ringt at prógva munnligar avtalur.

Sum eg dugi at siggja, so eigur vinkona tygara ongan rætt til nakað eftir mannin, hon hevur livað saman við. Hon eigur tó rætt til tað, hon sjálv hevur fingið til vega. Tað má hon so halda fast við yvirfyri teimum, ið arva mannin.

Um hon ikki fær tað, hon heldur seg eiga, má hon eins og í øðrum førum, tá ið ósemja er um ognarviðurskiftir, fara til dómsvaldið og krevja sín rætt.

Eru trupulleikar, haldi eg, vinkona tygara skal venda sær til sakførara.

Viðmerkjast skal, at tað ger ongan mun, um samlívið hevur vart leingi ella stutt viðvíkjandi arvarætti.

Marjun

Læknin:

Hvat bagir mær?

Kundi lækin svara mær, hvat mær bagir. Eg kenni meg friska, men tað er bara tað, at eg havi ikki havt menstratiónina í trý ár, tó at eg eigi eitt vælskapt ársgamalt barn. Eg havi verið hjá lækna, men hann helt, at mær bagdi einki. Eg eri fyrst í tjúgunum og vigi 65 kg. Eg eri gift.

Kvinnan

Eftir hesum fáu upplýsingum er tað púra ógjørligt at svara ítøkiligt.

Tygum siga, at tygum hava átt barn, tað vil siga, at hormonfunktión tygara er í lagi, men tygum nevna einki um tað var nakað serligt galið í samband við barnsburðin.

Har- er møguliga ein orsøk til at mánasjúkan ikki kemur aftur.

Tað finnast tó nógvar aðrar orsøkir.

Her verður fyrst og fremst hugsað um sálarligar trupulleikar.

Eitt nú um tygum eru sálarliga fyrispent, tí tað gevur við vissu hjá mongum trupulleikar við mánasjúkuni.

Tygum nevna heldur einki um tygum taka fyribyrgjandi evni, sum kanska er orsøk til hetta. Her verður hugsað um mini p-pillarar, sum hjá nógvum ger, at mánasjúkan verður burtur.

Tí eiga tygum fyrst at fara til læknan einaferð afturat.

MS

Rúsdrekka og pennisilin

Mangan hevur verið at hoyrt, at tú ikki skalt nýta rúsdrekka um tú tekur pennisillin, men ongantíð hevur verið sagt hví.

Er tað tí rúsdrekka ávirkar pennisilin, so tað ikki fær ætlaða virkningin, ella hvussu?

Kann lækin siga nakað um hetta?

K.

Tað er vanligt at hoyra, at fólk sum fáa pennisilin tablettir ella sum innsprøning, ikki mugu nýta rúsdrekka.

Eg tori ikki at siga við vissu, um rúsdrekka hevur ávirkan á pennisilin. Kortini eru tað nógv evni — heilivágur, sum ikki má vera tikin saman við rúsdrekka.

Dømi kann vera ávísar nervatablettir, sum ikki rúsdrekka situr saman við, tí heilivágur tá ikki gevur ætlaða ávirkanina á likamið, heldur tvørturímóti. Serliga vælkent er fyribrigdið rúsdrekka og antabus.

MS.

Vatn í kroppinum

Eg eri ein 49 ára gomul kvinna, sum havi stórar trupulleikar, tí so nógv vatn er í kroppinum.

Eg havi verið hjá lækna. Hann segði at blóðtrýstið var í lagi, og at hann ikki kundi finna nakað óvanligt við mær.

Enn eri eg ikki varug við, at skiftisaldurin er byrjaður tá eg havi mánasjúku regluliga.

Kann lækin siga mær, hvat eg skal gera fyri at sleppa av við vatnið.

Viðmerkjast skal, at eg havi vatn í kroppinum fleiri ferðir um mánaðin, og at hetta sostatt ikki er nakað, sum bert er áðrenn mánasjúkan kemur.

R.

Tá tygum nú eru 49 ár og hava nevndu trupulleikar, vildi eg í fyrsta umfari sett tað í samband við skiftisaldurin, sjálvt um mánasjúkan er í lagi enn.

Tað kunnu vera ymiskar orsøkir til, at tygum hava vatn í kroppinum, men hvussu vita tygum, at tað er vatn?

Eg vildi hildið tað verið rættast at farið til læknan enn einaferð, um hetta truplar tygum ov nógv.

MS.

Føðingardagur

Í dag fyllir Jákup Pauli Johannesen, Kollafirði, 85 ár. Føðingardagurin verður hildin í bygdarhúsinum friggjakvøldið 11. mars.



Dallas

11. mars: Leif Láadal (aldursmark 15 ár)
12. mars: Jákup Magnussen
13. mars: Jákup Magnussen

Kvøldlot:

10. mars: Black Birds
11. mars: Black Panters
12. mars: Martin leggur plátur á
(Aldursmark 15 ár)

Havnar Jazzfelag

11. mars: Septettin
12. mars: Brongl

Bussførarar tryggja seg:

— Vit seta bussin um annað arbeiði er í boði

Av tí at so nógv ivamál hava verið hjá bussførarum á Bussleiðini, sum herfyri vóru uppsagdir 1. apríl í ár, tóku teir stig til ein fund at tosa um hvussu teir frameftir skulu fyrihalda seg mótvegis arbeiðsplássinum, sum er Bussleiðin í Havn.

Mánakvøldið var fundur, har allir 14 bussførarnir hittust at tosa um felagsmál innan vinnu teirra.

Ein av teimum, sum tók stig til fundin er John Eysturoy, bussførari, sum eisini segði sína hugsan um, hvat kundi verið ført fram, um Bussleiðin var niðurløgd, og hvat var til at taka, um menn nú noyddust út at sóknast eftir arbeiði.

Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við John Eysturoy, sum sigur, at undirtøkan til fundin var 100 pst.

— Tað hevur týdning í okkara støðu, at vit standa saman um tað sum skal henda, fyri at tryggja okkum, um so skuldi verið, at vit mistu arbeiðið.

— Tað stendur fast, at vit eru uppsagdir frá 1. apríl í ár, og tí kenna vit okkum ógvuliga kroystir av, at einki er gjørt fyri at fáa greiði á hesum máli.

Vit samráddust á fundinum um, hvat skuldi henda eftir 1. apríl, og um hvussu vit skuldu tryggja okkum, at sleppa í annað arbeiði, um hetta stóð okkum í boði.

Viðtikið varð, at vit ikki eftir 1. apríl skullu koyra eftir tí gamla sáttmálanum, men at vit ístaðin skulu arbeiða fyri tímaløn yvirtíð og forskotnari tíð útjavnað, av tí at arbeiðstíð okkara er á so nógvum ymsum tíðarskeiði í samdøgrinum.

Vit hesi lønarskipan eru vit leysir av Bussleiðini frá einum tíma til annan, og kunnu sostatt seta bussin beinanvegin, um okkurt arbeiði er okkum í boði, aðrastaðni.

Tó vilja vit seta fram krav um, at í tí føri, at Bussleiðin heldur fram í hesi ella aðrari skipan, so skulu allir bussførarar setast av nýggjum.

At enda vóru vald tvey umboð fyri bussførarnar, sum kundu átaka sær at samráðast við leiðsluna á Bussleiðini og Býráðið, um tað varð eitt ynski frá einum av pørtunum.

Hesi vóru John Eysturoy og Hildebrand Midjord.

At enda sigur John Eysturoy, at bussførarnir kenna seg ótryggar og kroystar av teimum viðurskiftum, sum teir nú arbeiða undir, og at teir kenna seg noyddan at gera vart við hetta nú, so teirra sømdir eisini kunnu havast í huga, tá støða skal takast til framtíðina hjá Bussleiðini.

Fundurin hjá bussførarunum er góðtikin av Havnar Handverkarafelag og innførdur í gerðabók felagsins.

Dag.